# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 10. november 2009



Eingin yvir og eingin við síðuna. Troyggjusølan við troyggjum hjá Ronaldo og Kaká er bara fjórðingurin av tí, sum hon var við David Beckham á liðnum hjá Real Madrid

# Beckham var nógv størri

**Í Madrid mugu tey ásanna, at hóast felagið í ár hevur brúkt meira pening enn nakrantíð, er glæman av stjørnum sum Ronaldo og Kaká ikki í nær námind henni hjá David Beckham**



Jákup Mørk

Tá Real Madrid í 2003 keypti David Beckham úr Manchester United, skuldi stórur partur av sølupeningi-num fíggjast við troyggjusølu. Og tað eydnaðist.

Sølan av troyggjum við 23-talinum á rygginum rakk tá ókendum hædd-um, og samlaða troyggjusølan hjá Real Madrid øktist við 27 prosent-um tað árið. Av hesum átti Beckham einsamallur tey 22 prosentini.

- Øll vildu hava troyggjuna hjá Beckham. Ja, sjálvt lagkøkur við hansara troyggjutali vórðu gjørdar, og allur býurin varð fangaður av Beckham-bylgjuni, verður sagt á marknaðardeildini hjá Real Madrid.

Og her koma hvørki Ronaldo ella Kaká í nær námind enska fótbólts- og mótaikoninum.

Sølan av troyggjum hjá Real Madrid er nevnliga bara ein fjórðing av tí, sum hon var í 2003, hóast felag-ið í ár hevur keypt tær báðar mega-stjørnurnar fyri ein prís, sum saman-lagt fer upp um milliardina.

Ein partur av skuldini stavar helst frá fíggjarkreppuni og risa arbeiðs-loysinum, sum er í Spania. Men hóast framúr fótbóltsevnini, so røkka hvørki Kaká ella Ronaldo Beckham til kníggja sum vørumerki, er niðurstøðan í Madrid.

# Tveir Sunset-dystir í morgin

**Neistin var einasta liðið, sum ongan tíð tapti móti Tjaldri í fjør. Í annaðkvøld hittast liðini fyri fyrstu ferð hetta kappingarárið. Og á Skála skal StÍF royna at fáa síni fyrstu stig, tá VÍF vitjar**



Jákup Mørk

Eftir at bert ein dystur stóð á skránni um vikuskiftið, eru tveir dystir í bestu kvinnudeildini í morgin.

Tjaldur hevur higar til vunnið allar sínar dystir hetta kappingarárið, og meistaranrir eru eisini favorittar, tá tær taka ímóti Neistanum.

Hinvegin var Neistin einasta liðið, sum ikki tapti móti meistarunum seinasta kappingarár, og so er spurningurin, um nú umskipaða Neistaliðið aftur megnar at halda fast í somu góðu gongd.

Gera tær bláu ikki tað, tykist kappingarárið hjá teimum mest sum longu nú at enda í ongamannalandi, har tær eru langt frá botninum, men samstundis ov langt frá oddinum.

Í botninum eigur StÍF enn síni fyrstu stig tilgóðar, og ivaleyst ætla tey at vinna sær hesi, tá tær fáa vitjan av VÍF. Saman við VB eru tey bæði liðini partur av botnstríðnum, men VÍF hevur sum einasta av teimum trimum vunnið sær stig, tá tær á heimavølli vunnu á VB.

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 182 | 126 | 56 | 10 |
| 2 Tjaldur | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 165 | 116 | 49 | 10 |
| 3 Neistin | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 136 | 112 | 24 | 8 |
| 4 VÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 110 | 148 | -38 | 2 |
| 5 StÍF | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 81 | 126 | -45 | 0 |
| 6 VB | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 99 | 145 | -46 | 0 |